Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Leif Groth 75



Seinasta leygardag, 9. apríl, fylti fyrrverandi ríkisumboðsmaðurin Leif Groth 75 ár. Hann fylti sostatt 10 ár sama dag, sum týskarar hersettu Danmark.

Leif Groth, sum loysti Mogens Wahl av sum ríkisumboðsmaður, var føddur í Keypmannahavn. Foreldrini itu Vita Andersen og Helge Groth. Hann er útbúgvin cand.polit. Hann fekk starv í danska forsætisráðnum, fyrst sum skrivari í 1959 og sum fulltrúi frá 1967.

Í 1972 kom hann til Føroya at vera ríkisumboðsmaður og var her í 9 ár. Tað var júst, meðan hann røkti hetta starv, at tað umsitingarliga virkisøkið hjá Ríkisumboðnum minkaði nógv, tí í sjeytiárunum kom ferð á yvirtøkurnar, sum høvdu ligið á láni mestsum síðan 1948, tá Heimastýrið varð stovnað og tær fyrstu yvirtøkurnar vórðu framdar. Í sjeytiárunum yvirtók Landsstýrið umsitingina av skúlaverkinum og almannaverkinum, og tað minkaði nógv um virkisøkið hjá ríkisumboðsmanninum.

Tað er vanligt, tá ríkis umboðsmenn fara úr Føroyum, at teir fáa eitt amtmansstarv í Danmark. Leif Groth gjørdist statsamtmaður og stiftsamtmaður í Århus til 1999, tá hann fór frá fyri aldur.

Leif Groth hevur verið giftur tvær ferðir. Fyrra konan æt Gudrun Rachel Mathorne og tann seinna Charlotte Merete Back.

# Nýggjur ovasti í Mjørkadali



Ole Friederich, oberstløjtnantur, er nýggjur ovasti hjá Færøernes Kommando.

Starvssetanin, sum varð lýst av Margretu Drotning, tók gildi 1. mars, og frá 1. apríl at rokna avloysti Ole Friederich Ole Ryberg. Hesin fer framyvir at virka í leiðsluni fyri Flyvestation Aalborg.

Ole Friederich hevur seinastu fýra árini verið leiðari fyri Air C2 støðina hjá Nato í Ramstein í Týsklandi. Hetta er annars ikki fyrsta ferðin, at Friederich starvast í Føroyum. Árini 1981-1983 var hann operatiónsoffiserur á Flyvestation Tórshavn.

# Tøkk

Øllum tykkum, sum gleddu meg á 80 ára føðingardegi mínum við uppringingum, telegrammum, vitjan og gávum takki eg hjartaliga.

**Heilsan Sigurd Nybo**

# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum minstust meg á 85 ára føðingardegi mínum.

Takk fyri vitjanir, blómur, heilsanir og fjarrit.

Eina serliga tøkk til børn, ommubørn, langommubørn og oldurommubørn fyri at tit gjørdu mær dagin so hugnaligan við sangi, mati og blíðskapi.

Stóra tøkk øll somul.

**Heilsan Beata í Dali**

**Dagurin**

**12. apríl. Julius**, deyður í 352. Til minnis um pávan Julius I. Rómverskt ættarnavn.

## Rætting

Í samband við at vit skrivaðu um móttøkuna, Eirargarður 25 ár, í blaðnum 8. apríl 2005, kom av misgávum eitt navn og starvsheiti skeivt fyri.

åVit skrivaðu at Jóannes Dalsgarð var leiðari fyri heimarøktina og serforsorgina. Hetta er ikki rætt.

Jóanes N. Dalsgaard er leiðari fyri Serstovnadeildina, sum er deild undir Heimarøktini og Serforsorgini.

Leiðari fyri Heimarøktina og Serforsorgina er Mary í Garði.

Vit biðja orsaka mistakið

**Sosialurin**

# Jütta Jacobsen á Bakka

*Heilsan til mammu*



Tú ert perlan hjá okkum,
dýrgripurin vit fingu.
Tú gavst okkum lívið,
sum smá vit um teg gingu.

Tú vart eins og morgunglæman,
hvussu myrk náttin var,
so var ljósið frá tær,
brátt til áljósan dag.

Tú vart gleðin í heimi,
ein kjarni av kæti.
Barnanna kelda við gleimi,
sálanna fylla av mati.

Lívsgleðin hjá tær tín styrki,
trúðfestið í tær tín verja.
friðsælan um teg títt yrki,
tí kundi einki teg berja.

Tú dýrabara perla
sum gulleplið í hjarta,
vit teg goyma.
Takk at vit fingu teg,
tú leiddi okkum lívsins veg.

**Hans Jacobsen**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Ottar Jacobsen**

andaðist leygarmorgunin 9. apríl, 73 ára gamal.

Kistan fer av Landssjúkrahúsinum heim í Havnar kirkju
týsdagin 12. apríl kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
mikudagin 13. apríl, kl. 13.00.

*Vegna familjuna*

**Hildigunn**

Tey, ið vilja minnast Ottar, kunnu lata Føroya Felag Móti Krabbameini eina peningagávu.